


» ... í vár var nógvur toskur at fáa á Flemmish Kap, og várið plagdi eisini at vera besta fiskitíðin har yviri...
MORTAN JOHANNESEN, REIÐARI



*Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, stutt eftir, at skipið hevði lagt til bryggju í Havn í gjár*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# BERG AFTUR LEMMISH KAP

Vilmund Jacobsen

Enniberg er fyrsta føroyska skipið, sum eftir 11 ára toskabann aftur hevur verið á toskaveiði á Flemmish Kap.

Tað eru stívliga tveir mánaðir, síðan hesin túrurin byrjaði.

Fyrst fiskaðu teir svartkalva í Vesturgrønlandi, og síðan fór skipið at fiska av føroyskari toskakvotu á Flemmish Kap.

Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, sigur, at nú túrur er lokin, er eitt sindur meiri enn helmingurin av veiðini skráskorin svartkalvi, meðan hin helmingurin er toskaflak úr góðum toski av Flemmish Kap.

– Vit høvdu góða veiði á Flemmish Kap, og stutt áðrenn vit fóru at sigla heim, var eisini væl av fiski at fáa har yviri. Síðan kom illveður, samstundis sum hitin fall fleiri stig, og tá minkaði fiskiskapurin burtur, sigur skiparin, sum leggur aftrat, at ørgrynni av yngli var at síggja, har teir royndu.

» ... vit høvdu góða veiði á Flemmish Kap, og stutt áðrenn vit fóru at sigla heim, var eisini væl av fiski at fáa har yviri...
SONNY JOHANNESEN, SKIPARI

Við Ennibergi hendan túrin eru umleið 30 mans.

## Best um várið

Reiðarin á Ennibergi, Mortan Johannesen, sigur, at rættiliga nógvur toskur var at fáa á Flemmish Kap í vár, og hann veit eisini at siga, at várið áður plagdi at vera besta fiskitíðin á hesum leiðum.

– Vit gjørdu avtalu við teir, sum eiga Vesturvón og Gadus um, at vit kundu fiska toskakvotuna á Flemmish Kap, samstundis sum hini skipini fingu ein størri part av kvotuni í Barentshavinum. Enniberg eigur kvotu eftir á Flemmish Kap, men nú skipið er komið heimaftur, er óvist, hvussu verður við tí, sum eftir er.

Á NAFO-ársfundinum, sum var í Halifax í síðstu viku, fingu Føroyar 1000 tons av toski aftrat á Flemmish Kap í komandi ári, soleiðis at samlaða toskakvotan tá verður 2.235 tons.

Mortan Johannesen veit av góðum grundum ikki, hvør sleppur at fiska hesi tonsini komandi ár, men hann heldur, at toskaveiða á Flemmish Kap avgjørt er vorðin ein spennandi møguleiki aftur, eftir at toskabann hevur verið á hesum leiðum í heili 11 ár.

vilmund@sosialurin.fo